# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Mørkøre til FC Hoyvík

Allan Mørkøre, sum var fyribilsvenjari hjá B36 í seinnu kappingarhálvu í fjør, er farin aftur í fótbóltsskógvarnar. 39 ára gamli klaksvíkingurin venur við FC Hoyvík, sum skal spæla í næstbestu deildini. Umframt Allan Mørkøre, eru Jan Guttesen og Jákup Martin Joensen við í fyrireikingunum hjá hoyvíkingum. FC Hoyvík endaði nummar sjey í 2010. Jan Mølvad Laursen er venjari í ár.



*Allan Mørkøre*

# KÍ hevur 500.000 krónur í yvirskoti

**FÓTBÓLTUR** Á aðalfundinum hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag fríggjadagin vísti roknskapurin yvirskot á 500.000 – eina hálva millión – krónur

Uni Holm Johannesen

Tað var samtykt at lække limagjaldið niður í helvt.

Tað skrivar Norðlýsið.

Tummas Lervig, formaður, boðaði frá, at hetta var seinastu ferð, at felagið hevur serskyldan roknskap at taka støðu til. Sambært nýggju UEFA-krøvunum skal KÍ gera konsernroknskap fyri KÍ, Stjørnuna, Sp/f KÍ og KÍ-høllina næsta ár. KÍ eigur helvtina av partapengunum í P/F KÍ-høllin.

Tummas Lervig var afturvaldur sum formaður.


*Tummas Lervig, formaður*
*Savnsmynd*


*Møguligur styrkur til toftamenn*
*Mynd: www.b68.fo*

## Senegalesi royndarvenur við B68

**FÓTBÓLTUR** Abdoul Aziz Diene royndarvenur við B68 í hesum døgum

Uni Holm Johannesen

Tað er Ahmed Keita, sum hevur mælt felagnum til at royna hann, skrivar heimasíðan hjá toftamonnum.

Abdoul Aziz Diene er 25 ára gamal. Tíðin fer at vísa, um hann kann brúkast, vísir heimasíðan á.

*uni@sosialurin.fo*

# Verkætlanin er broytt

**FÓTBÓLTUR** Sjálvognarstovurin 1892 legði fram sínar ætlanir at byggja fótbóltsvøll í Trongisvági fyri býráðslimunum í Tvøroyra Býráð í síðstu viku


*Mynd: www.1892.fo*

Uni Holm Johannesen

Poul Erik Smedemark, formaður í 1982, sigur við Suðuroyarportalin, at býráðslimirnir vístu á ymiskt, sum teir ikki reiðiliga kundu taka undir við. Tað var serliga ein trupulleiki, at umstøðurnar hjá útibarnagarðinum versnaðu.

Verkætlanarbólkurin hevur broytt sínar ætlanir nakað, boðar Suðuroyarportalurin frá.

– Nú er verkætlanin broytt soleiðis, at stovnarnir í kjallarahæddini ikki á nakran hátt verða órógvaðir í samband við fótbóltsvøllin. Ynskini hjá býráðslimunum eru gingin á møti, og tí rokni eg við, at býráðið gevur byggiloyvi til verkætlanina á býráðsfundinum, sum verður týskvøldið, sigur Poul Erik Smedemark við sudurras1.com.

*uni@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva:

Jan Ottosen, KÍF venjari, man óivað hava góða tiltrúgv til KÍF spælararnar at teir koma í FM-finaluna. Tí letur hann lyklaspælarar ikki spæla í Hoyvík. Men hann kann blíva snýttur á mállinjuni. Vit onnur høvdu satsað øðrvísi og høvdu í hvørjum dysti bart fyri FM-finaluplássinum.

*www.neistin.fo*

Kyndil átti at verið sterkari enn VÍF í Sunset-kappingini, men VÍF spældi ein góðan dyst í dag, og Kyndil spældi ikki við somu sannføring sum fleiri ferðir fyrr í ár

*www.kyndil.fo*

Í seinna hálvleiki varð Sámal mansvardur frá fyrsta bríksli, og tað vísti seg at skapa so mikið av órógv í spælið hjá VÍF, at Kyndil spakuliga kom við í dystin aftur. Sum nevnt so hildu vit kortini tørn fyrstu tíggju minuttirnar og skuldu havt avgjørt dystin.

*www.vif.fo*

Eitt illa skert Team Klaksvík lið tapti stórt aftur hesaferð. Steffan Kalsø er farin niður í lestrarørindium og verður tí ikki við aftur í ár. Eisini eru Jón Jacobsen, Beinur Heðinsson skaddir og Finn a Svøð var burtur vegna sjúka á Skála.

*www.team-klaksvik.com*